# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Anton Skorastein í Leirvík 80 ár 27. juli

Mamma, Jacobina (Bina) f. Johannesen, Lamba, pápin Joan Petur, f. Joensen Skorastein, Leirvík.

Barnaárini vóru góð, tók lut í arbeiðinum, til húsarhaldið velti eplir, arbeiða torv, vit høvdu torv í trimum støðum uppi í Straffini, úti á Dalinum eysturi á Vatnhamar. Tað var gott at vera nógv systkin, so kundu vit hjálpast við arbeiðinum. 11 systkin, 6 dreingir, 5 systrar, har ein beiggi er deyður í 2006.

Nógvur seiður er at fáa í Leirvíksfirði, at fara á seiðaberg var so vanligt, bátur var altíð í húsinum, eitt gott summarkvøld vóru eisini gentir við at dyrgja eftir seiði. Eg minnist ein túr eitt systkinabarn var komin heim, so vit fóru við at dyrgja, vit høvdu runddorg, so vit fingu 170 seiðir. Sum ungur spældi tú hondbólt, málmaður, vitjaðu á Tvøroyri og vunnu. Vóru eisini túr í Sørvági.

Tú royndi teg eisini sum sjómann, undir Føroyum við Varvasteini, við Sæborg við línu undir Føroyum. Ein túr til Ísland við bátinum Søkin. Tá Turkihúsið kom, har hevði tú náttarvakt og telja fisk til kørini, har kvinnurnar vaskaðu fisk, sum bleiv stakkaður og seinri breiddur út á fiskastykkið ella lagdur upp á trennur, passaði motorin samstundis. Ja so bleiv tú sjaufør, nýggjan bil í 1963, koyrdi millum Leirvík og Toftir, tað vóru baldrutir túrar, vit koyrdu eftir tí gamla Leirvíksvegnum, tá var eingin gravkúgv, so vit máttu grava við spaka. Tey seinru árini hevur tú arbeitt í Tævuni, passa frystiskápið og kanska upplært onkran unglingin upp.

Tú engdi stampar hjá Kjartan.

Vit takka tær, at tú altíð hevur tikið væl ímóti okkum, og altíð er tann sami. Vit ynskja tær eina bjarta framtíð og nógv góð ár í framtíðini

Heilsan

**systir tín Kata**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at okkara kæri

**Pól Martin Abrahamsen,**
**Strendur**

andaðist fríggjadagin 08. august 2008
á Ríkissjúkrahúsinum 48 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Sjóvar kirkju
mikudagin 13. august kl. 14.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Karen**

Tey ið vilja minnast Pól Martin, kunnu lata eina peningagávu til nýggja missiónshúsið á Strondum. Konta í peningastovnunum.

### 80 ára føðingardagur

Týsdagin 12. august fyllir Óli í Geil, Klaksvík, 80 ár. Tey, ið vilja heilsa uppá Óla eru vælkomin í heimið frá kl. 10-13.

### 60 ára føðingardagur

19. august verður Måns Persson, Norðagøtu 60 ár. Føðingardagurin verður hildin heima leygardagin tann 16. august. frá kl. 19.

### 50 og 55 ára føðingardagar

Leygardagin 23. august, kl 19 halda Hallbjørg Hansen og Eiler Poulsen, Argir (fyrr Kambsdalur) 50 og 55 ára føðingardag í HB-húsinum. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða vinarligast biðin um at siga frá á telefon nr. 314796 ella 514796 ella á telduposti: hallbjorg@kallnet.fo. innan 15. august.

### Silvurbrúdleyp

Mánadagin 25. aug. hava Mai-Britt og Trygvi Berg Søldarfjørður Silvurbrúdleyp.
Dagurin verður hildin leygardagin 23 aug á Svangaskarði kl 19.00.
tey í vilja gleða okkum við at koma verða biðin um at siga frá á
Tlf :267512 ella Tlf : 747685 innan mánadagin 18 aug.

### Brúdleyp

Leygardagin 16. august giftast Anna Simonsen og Óli Joensen. Vígslan verður Undir Fossum 32 kl.13. Brúdleyp verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.

### Dagurin

**12. august. Klara,** deyð í 1253, var av aðalsætt úr Assisi. Fór í fylgið hjá hinum heilaga Fransi, og eggjað av honum grundlegði hon eitt nunnukleystur og skipaði eina nunnuskipan, klarisurnar nevndar. Navnið er latínskt, hin *kenda* ella *skæra*.

## Bíblian innblást av Gudi – ikki mannaorð um Gud

**RICHARD DANIELSEN**



### Tríatiundi fjórði partur

Malakias er seinasti profeturin í gamla testamenti. Uml. fýrahundrað ár gingu og eingin profetasjón kom, inntil Jóhannes doyparin steig fram.

Malakias sigur tað sama, sum hinir. Bókin byrjar við at siga, at hetta er orð Harrans til Ísrael við Malakiasi. Hann talar til Ísrael og um tjóðirnar, serliga Edom.Hann revsar fólkið og prestarnar, sum hava borið seg viðurstyggiliga at. Mær tykir, at Malakias er aktuellur. Hann talar um hjúnarbandið, og vit síggja, at Harrin hevur ikki broytt meining hesum viðvíkjandi, hóast hann tolererar nógv. Í Kap.2,16 sigur hann hetta:

Tí Eg hati skilnaðarsótt - sigur HARRIN Gud Ísraels; við henni sveipar ein yvirgang um klæði síni - sigur HARRIN Gud herskaranna. Aktið tí eftir anda tykkara og verið ikki trúleysir!

Allir teir mongu hjúnaskiljanir í dag eru eitt stórt vandamál og eru hóttafall í samfelagnum . Tað gongur út yvir børnini og ávirkar alt samfelagið tann skeiva vegin.

Eisini vers 17 tykir mær aktuelt:

Tit hava troyttað HARRAN við orðum tykkara! - Tit spyrja: ”Við hvørjum hava vit troyttað Hann?” Við at siga: ”Hvør tann, sum ilt ger, er góður í eygum HARRANS, og slíkir eru Honum til gleði!” - ella: ”Hvar er tann Gud, sum dømir!”

Fólk stíga fram og siga bíbliuni beint í móti, men samstundis gera tey krav uppá at tey eru kristin og trúgva. Hvørjum trúgva hesi, tá ið tey ikki trúgva bíbliuni.

Onnur siga: Hvar er tann Gud ið dømir. Tey hava onga trúgv á Gud yvirhøvur.

Í triðja kapitli talar Malakias um Messias og undangongumann hansara, sum jú er Jóhannes doypari. Síðani hevur hann seinast í kapitlinum nøkur troystandi orð til tey, sum hugsa um Harran. Og aftur í fjórða kapitlinum, sum er tann seinasti í gamla testamenti, troystar hann tey sum óttast Harran á ein so undurfullan gerandisligan hátt, mitt í tí ræðuligu tíð tá ið dómur Guds rakar hendan heim. Kapitulin byrjar við, at dagurin kemur brennandi sum ovnur og skal gera enda á teimum gudleysu. Mitt í hesum troystar Harrin tey, sum óttast hann. Hann talar um rættvísisó, sum skal renna upp, og at tey skulu spæla sum gøðingarkálvar. Hetta fær meg at hugsa um at hetta, sum hann tekur fram her er nakað av tí vakrasta og friðfullasta, sum vit kenna frá hesum lívi. Hvussu gleðast vit ikki, tá ið sólin rísur ein fagran várdag. Og um vit seta smálombini inn ístaðinfyri køðingarkálvarnar, sum ikki eru so væl kendir her hjá okkum longur. Hasi bæði tingini, ein vakur morgun við smálombum á bønum, tey eru okkum so væl kend. Ein ógvuliga góð mynd, sum andar av friði.

Síðani leggur Malakias skriviamboðið frá sær og tøgn er í fýrahundrað ár, intil Jóhannes doypari stígur fram.

Framhald.




Arbeiðsfólk

Pizza 67 í Tórshavn søkir arbeiðsfólk at arbeiða í skiftandi vaktum.

**Vit ynskja at tú:**
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Ert álítandi og hevur góð samstarvsevni

Løn sambart avtalu.

Ynskir tú at frætta meira um starvið, so er tú vælkomin at ringja 586767 og tosað við Rana.

**Pizza 67**